LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 1. mars 2019
J.Nr.: LUM-30- 18/00092-5
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Kanning av mannagongdum hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við grannahoyringar í byggimálum**

Í framhaldi av einum klagumáli um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av einum byggimáli, avgjørdi umboðsmaðurin við heimild í § 6 stk. 5 í umboðsmannalógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann) at kanna, við hvørji heimild, nær og hvussu kommunan fremur grannahoyring í byggimálum, og hvørjar upplýsingar kommunan letur víðari í samband við grannahoyringar.

Tann 14. september 2018, sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu skriv um kanningina. Umboðsmaðurin vísti á, at hann í einum ítøkiligum klagumáli, sum hann hevði avvíst, varð kunnaður um, at Tórshavnar kommuna hevði upplýst um heilsustøðu klagarans í sambandi við eina grannahoyring. Vísandi til álvaran í spurninginum, nær ein myndugleiki kann lata heilsuupplýsingar hjá borgara víðari til 3. persón bað umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu greiða sær frá, við hvørji heimild, nær og hvussu kommunan fremur grannahoyring í byggimálum, og hvørjar upplýsingar kommunan letur víðari í sambandi við slíkar grannahoyringar. Eisini varð kommunan biðin um at gera viðmerkingar til grannahoyringina, sum kommunan hevði framt í ítøkiliga klagumálinum.

Tann 31. oktober 2018 fekk umboðsmaðurin hetta svar frá kommununi:

> “**Viðv. fyrispurningum um m.a. mannagongdir í sambandi við grannahoyring.**
>
> **Spurningur 1 og 2.**
> **Hvørja heimild hevur kommunan at gera grannahoyringar, og nær verða grannahoyringar framdar?**
> **Svar:**
> Sambært almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu, Kap. I, § 8. stk 1 og 2 er ásett:
> **§ 8. Lættar frá verandi reglum**
> *1. Byggivaldið kann, har tað er torført at halda ásetingarnar í hesi byggisamtykt, og har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi, geva lættar viðvíkjandi ásetingunum í hesari byggisamtykt.*

*2. Áðrenn lættar verða givnir, skulu boð sendast grannanum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi.*
Tá umsókn verður viðgjørd, sum ikki er í samsvari við ásetingarnar í byggisamtyktini, og mett verður, at málið er av lítlum týdningi, verður málið sent til grannahoyringar hjá nærmastu grannunum.

**Spurningur 3 og 4**
**Hvussu fremur kommunan grannahoyringar í byggimálum, og hvørjir upplýsingar verða víðarigivnir?**
**Svar:**
Grannahoyringin verður send viðkomandi grannum skrivliga, byggimálið verður lýst við øllum viðkomandi upplýsingum, so sum hvørjar ásetingar í byggisamtyktini umsókn ikki er í samsvari við, og hvørjar grundgevingar eru fyri, at umsøkjarin søkir um lætta frá ásetingunum. Harumframt verða tekningar, sum lýsa málið, altíð sendar við. Lagt verður dentur á, at tey sum móttaka grannahoyringina ikki eru byggikøn, og ikki eru von við at hyggja og skilja byggitekningar. Harumframt verður tíðarfreist altíð upplýst, og hvørjir grannar hava móttikið grannahoyringina. Talan er um standardskriv.

**Spurningur 5**
**Viðmerkingar til grannahoyringina, ... apríl 2016 ...**
**Svar:**
Umsókn var kommununi í hendi í 2016, so umsóknin var viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.
Grannahoyringin varð send grannanum, tí umsóknin var ikki í samsvari við ásetingarnar í byggisamtyktini. Umsøkjarin greiðir frá í umsóknini, hvørjar grundgevingar eru fyri at biðja um lættar frá ásetingunum í byggisamtyktini, og í grannahoyringini verður sama orðing nýtt “at væntast kann, at ... (mín viðmerking: framtíðar heilsustøðan hjá húskinum).
Sum upplýst í grannahoyringini, so verða bert tekningar av bygningini sendar grannanum. Tað vil siga, at tað sum umsøkjarin upplýsti í umsóknini annars, varð ikki sent til grannan.
Tað er møguligt at ein onnur orðing kundi verið nýtt, t.d. vegna sjúku, men mett verður ikki, at Tórshavnar kommuna hevur upplýst grannanum nakað um heilsustøðuna hjá umsøkjaranum.“

Tann 29. november 2018 sendi Tórshavnar kommuna, eftir umbøn frá umboðsmanninum, avrit av standardskrivinum, sum kommunan nýtir í sambandi við grannahoyringar og avrit av einum sonevndum “checklista”, sum verður nýttur í sambandi við byggimálsviðgerð.

## Mínar viðmerkingar um grannahoyringar í byggimálum

Tá Tórshavnar kommuna sum byggimyndugleiki viðger eina umsókn frá einum borgara um loyvi til bygging, eigur kommunan, áðrenn hon tekur støðu til umsóknina at kanna, hvør er granni í mun til byggingina, og um nakar granni kann roknast sum partur í málinum.

Hetta skal gerast, so kommunan kann taka støðu til, um neyðugt er at fremja hoyring av grannum ella pørtum í málinum, og fyri at hoyringin verður framd á rættan hátt og eftir røttu reglum t.v.s. eftir ásetingunum í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu, Bygningskunngerðini (kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 Kunngerð um bygningskunngerð 2017) og ella eftir fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993).

Um grannin bert er at rokna sum granni ella eisini er partur í málinum, er avgerandi fyri, hvat viðkomandi kann kunnast og hoyrast um, og í hvønn mun viðkomandi hevur rætt til innlit í byggimálið, og hvørji onnur rættindi viðkomandi hevur t.d. til at fáa grundgeving og at kæra.

*Grannahoyring*

Er talan um byggimál, har byggiloyvi bert kann játtast, um kommunan loyvir frávik frá ásetingunum í bygningsreglugerðini 2017 (skjal 1 í bygningskunngerð 2017), er í pkt. 1.10 í bygningreglugerðini 2017 ásett soleiðis :

> ”Stk. 1. Kommunali byggimyndugleikin kann geva loyvi til frávik frá bygningreglugerðini, tá mett verður, at tað ber illa til at byggja eftir ásetingunum í bygningsreglugerðini.
>
> Stk. 2. Áðrenn fráviksloyvi verður givið, skal hoyringsskriv sendast grannunum, soleiðis at grannarnir hava møguleikar at gera viðmerkingar til frávikið
>
> ...“

Í § 8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett soleiðis um frávik:

> “§ 8. Lættar frá verandi reglum
>
> 1. Byggivaldið kann, har tað er torført at halda ásetingirnar í hesi byggisamtykt, og har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi, geva lættar viðvíkjandi ásetingum í hesari byggisamtykt.
>
> 2. Áðrenn lættar verða givnir, skulu boð sendast grannanum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi”

Endamálið við slíkum grannahoyringum er, at grannarnir fáa høvi at kunnu seg um ætlaðu byggingina og fáa møguleika at siga sína meining um byggingina, og hvørjar møguligar ampar standast av henni, áðrenn kommunan tekur støðu til, um byggiloyvið við fráviki skal játtast.

Tá kommunan sendir eina umsókn um loyvi til bygging í grannahoyring, má kommunan meta um, hvørjar upplýsingar kommunan gevur grannunum. Kommunan skal kunna um umsóknina, so grannarnir kunnu meta um, hvørt byggingin er til nakran ampa fyri teir. Tað er tó ikki vist, at grannarnir altíð skulu hava kunning um orsøkina til, at umsøkjarin hevur søkt um byggiloyvi við fráviki, tí orsøkirnar hjá umsøkjaranum eru sum oftast ikki avgerandi fyri, hvussu byggingin ávirkar grannan. Eisini kunnu orsøkirnar verða tengdar at persónsupplýsingum um umsøkjaran, sum kommunan ikki hevur rætt at lata grannunum uttan serligt heimildargrundarlag.

Er talan hinvegin um bygging, sum ikki krevur frávik, tí byggingin lýkur allar treytir sambært bygningsreglugerðini og almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu, er einki krav um, at kommunan kunnar grannarnar um ætlaðu byggingina, áðrenn byggiloyvið verður givið. Men

er onkur granni at rokna sum partur í málinum, er støðan tó ein onnur, sí niðanfyri um partshoyring.

*Partshoyring*
Partar í einum máli skulu hoyrast eftir reglunum í § 18 í fyrisitingarlógini.

Er onkur av grannunum at meta sum partur í byggimálinum, tí broytingin, sum byggingin hevur við sær, ítøkiliga mett kann ávirka ella vera til ampa fyri viðkomandi, eigur kommunan at partshoyra viðkomandi um byggimálið eftir reglunum í fyrisitingarlógini. Hetta er galdandi bæði tá bygningsreglugerðin 2017 og almenna byggisamtyktin seta krav um grannahoyring um bygingina og í førum, har tað ikki er krav um grannahoyring.

Reglurnar um partshoyring eru í § 18 í fyrisitingarlógini, har stk. 1 og 2 eru soljóðandi:

> **§ 18.** Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið.
> *Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um so er, at
> 1) tað, soleiðis sum upplýsingarnar og málið er háttað, ikki kann metast at vera ivingarsamt, at taka avgerð í málinum á verandi grundarlag,
> 2) frest fer at viðføra, at farið verður út um lógásetta freist fyri avgerð í málinum.
> 3) áhugi partanna í, at avgerðin í málinum verður útsett, eigur at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri pørtunum sjálvum, ella øðrum privatum áhugamálum, ið tala í móti eini tílíkari útsetan.
> 4) parturin viðvíkjandi av varðandi spurningum ikki hevur rætt til skjalainnlit sambært reglunum í kapittul 4.
> 5) ætlaða avgerðin fer at nema ein víðari óvissan skara av persónum, fyritøkum v.m., ella um framløga av upplýsingunum fyri partinum fer at geva stórar trupulleikar, ella
> 6) tað við lóg eru gjørdar serstakar ásetingar, ið tryggja, at parturin fær høvi til at kunna seg um støðið fyri teirri ætlaðu avgerðini og til at geva ummæli í málinum, áðrenn avgerðin verður tikin.

Reglurnar í fyrisitingarlógini um partshoyring minna um reglurnar um grannahoyring, tí her skal kommunan eisini hoyra partarnar soleiðis, at partarnir eru kunnaðir um bygingina og hava møguleika at koma við síni meining, áðrenn kommunan tekur avgerð í málinum. Munurin er tó, at partshoyringin eftir fyrisitingarlógini ikki er treytað av, at talan er um loyvi til bygging, sum krevur frávik, men at talan er um granna, sum hevur partsstøðu tí broytingin, sum byggingin hevur við sær, ítøkiliga mett kann ávirka umstøðurnar hjá honum ella vera til ampa fyri viðkomandi.

Tað kann eisini vera, at parturin skal hava fleiri upplýsingar frá kommununi, enn kommunan hevur givið við grannahoyringini. Tí tá ein granni hevur partsstøðu sambært § 18 í fyrisitingarlógini, skal myndugleikin kunna partin um allar tær upplýsingar, sum kommunan hevur viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum í málinum, og sum tað má haldast, at parturin ikki er kunnigur við. Hetta kunnu vera fleiri upplýsingar enn tær, ið kommunan skal senda grannunum í sambandi við grannahoyringina. Tær upplýsingar, sum kunnu verða givnar í

sambandi við grannahoyring og í sambandi við partshoyring eru ikki altíð tær somu. Tað kunnu tí vera mál, har ein granni bæði skal hava grannahoyring eftir reglunum í bygningsreglugerðini og almennu byggisamtyktini og verða partshoyrdur eftir reglunum í fyrisitingarlógini.

Partar hava eisini rætt til innlit í viðkomandi byggimáli eftir §§ 9-17 í fyrisitingarlógini. Gongur avgerðin hjá kommununi um byggiloyvi ímóti áhugamálum hjá grannanum, sum hevur partsstøðu, skal hann hava grundgeving og hevur hann eisini rætt at kæra avgerðina.

Granni, sum er partur í byggimálinum, kann sum útgangsstøði fáa innlit í sjálva umsóknina um byggiloyvi og harvið eisini í grundgevingarnar hjá umsøkjaranum fyri at søkja um loyvi til bygging við fráviki. Inniheldur grundgevingin hjá umsøkjarunum persónsupplýsingar, herundir viðkvæmar persónsupplýsingar, kann tað vera, at kommunan ikki hevur loyvi at geva 3. persóni innlit í hesar upplýsingar vegna avgerandi umhugsni fyri øðrum privatum áhugamálum jbr. §§ 15, stk. 1 og 18, stk. 2 nr. 4 í fyrisitingarlógini, vegna tagnarskylduna jbr. § 26 í fyrisitingarlógini og sambært reglunum í §§8, 9 og 10 í persónsupplýsingarlógini (løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum) um krøv til viðgerð av persónsupplýsingum,

Hevur umsøkjarin í síni grundgeving fyri umsóknini givið kommununi persónsupplýsingar jbr. § 2, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini, herundir viðkvæmar persónsupplýsingar jbr. § 2, nr. 9 í persónsupplýsingarlógini, kann kommunan bert lata hesar upplýsingar víðari til 3. persón, um viðkomandi umsøkjari hevur givið kommununi samtykki til, at hesar upplýsingar kunna latast víðari, ella um kommunan hevur eina serliga lógarheimild til at lata upplýsingarnar víðari. Men eisini í førum, har neyðug heimild er til at lata upplýsingarnar víðari, skal latan av persónsupplýsingunum avmarkast til tey føri, har persónsupplýsingarnar eru viðkomandi fyri málið jbr. § 8, stk. 1, nr, 3 í persónsupplýsingarlógini um "dataminimering" t.e. at dátuábyrgdarin skal ansa eftir, at persónsupplýsingar bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkka endamálinum við innsavningini og víðari nýtsluni av persónsupplýsingunum.

*Ítøkiliga málið*
Í ítøkiliga málinum, sum elvdi til hesa kanning, varð søkt um loyvi til bygging, sum kravdi frávik.

Í apríl 2016 sendi Tórshavnar kommuna sambært reglunum í § 8 í almennu byggisamtyktini einum granna kunning um umsóknina um bygging við fráviki og gav grannunum møguleika at koma við viðmerkingum um bygningina. Saman við kunningarskrivinum lógu tekningar av bygningini. Viðmerkjast skal, at Bygningskunngerð 2017 og Bygningreglugerðin, komu í gildi 1. januar 2017 og var tí ikki galdandi fyri hetta mál.

Í skrivinum frá kommununi greiddi kommunan frá umsóknini um ætlaðu byggingina, og at játtan av byggiloyvi kravdi frávik. Síðani skrivaði kommunan:

> "Umsøkjarin grundgevur í umsóknini, at vegna sjúku, kann væntast, at ... (mín viðmerking: framtíðar heilsustøðan hjá húskinum), og er tí neyðugt við so stórum bilhúsi"

Sum eg havi víst á, er endamálið við grannahoyringini at kunna um byggingina, og at grannin fær høvi at gera viðmerkingar til byggingina. Hvør grundin er til, at umsøkjarin søkir um byggiloyvi við fráviki, er vanliga ikki avgerandi fyri møguleikan hjá grannum at meta um byggingina, og hvussu byggingin kann ávirka grannan ella grannalagið.

Um grannin fær nøktandi kunning um umsóknina um bygging við fráviki uttan at fáa upplýsingar um grundgevingarnar fyri umsóknini, er tað ikki neyðugt at lata grannanum hesar upplýsingar, fyri at kommunan skal halda sína skyldu um grannahoyring eftir reglunum í § 8 í almennu byggisamtyktini.

Um umsøkjarin hevur grundgivið umsóknina við upplýsingum um síni persónligu viðurskifti, kunnu hesar upplýsingar koma undir tagnarskyldureglunar í § 26 í fyrisitingarlógini, og undir reglurnar í §§ 8, 9 og 10 í persónsupplýsingarlógini um, at tað krevst eitt greitt heimildargrundarlag sum samtykki ella lógarheimild fyri at tað er lógligt at lata persónsupplýsingar víðari.

Kommunan kann tá bert við samtykki frá umsøkjaranum ella við serligari lógarheimild lata hesar upplýsingar til 3. persón, og bert um hetta er av týdningi fyri málið og endamálið við innsavningini av persónsupplýsingunum.

Í umsóknini í ítøkiliga málinum høvdu umsøkjarnir grundgivið umsóknina við framtíðar heilsustøðuni hjá húskinum. Tórshavnar kommuna sigur í síni frágreiðing, at kommunan í sambandi við grannahoyringina nýtti somu orðing sum umsøkjarin fyri at lýsa støðuna hjá umsøkjarunum.

Tórshavnar kommuna sigur, at tað er møguligt, at ein onnur orðing kundi verið nýtt, t.d. vegna sjúku, men kommunan metir, at kommunan við tí nýttu orðingini ikki hevur upplýst grannanum nakað um heilsustøðuna hjá umsøkjaranum.

Hesum eri eg ikki samd við Tórshavnar kommunu í. Tí sambært § 2, nr. 9 í persónsupplýsingarlógini eru allar upplýsingar um heilsu hjá persónum, sum kunnu eyðmerkjast, at meta sum viðkvæmar persónsupplýsingar. Sambært lógarviðmerkingunum til § 2, nr. 9 (s. 42) er hetta eisini galdandi, um upplýsingarnar eru um framtíðar heilsustøðuna hjá persónum.

Útgangsstøðið er tí, at kommunan, bæði sambært áður nevndu reglum um tagnarskyldu og sambært reglunum í persónsupplýsingarlógini, ikki kann lata hesar upplýsingar um heilsustøðuna víðari til 3. persón uttan ítøkiliga heimild, tað vil siga við samtykki frá viðkomandi ella við serligari lógarheimild.

Rætturin til innlit í byggimálið er, sum greitt frá omanfyri, ymiskur, alt eftir um tú "bert" ert granni, ella um tú eisini ert partur. Ert tú partur kanst tú vanliga fáa meira innlit í byggimálið, enn um tú bert ert granni, bæði tí parturin kann fáa fleiri upplýsingar í samband við partshoyringina, enn grannin hevur rætt til í samband við grannahoyring, og tí granni, sum søkir um innlit í byggimálið fær innlit eftir lógini um alment innlit, meðan granni, sum er partur í málinum, fær innlit eftir reglunum í fyristingarlógini.

Men júst tá tað kemur til viðkvæmar persónsupplýsingar, sum t.d. heilsuupplýsingar, sum talan er um í hesum máli, er útgangsstøðið, at kommunan altíð skal hava serligt heimildargrundarlag fyri at lata hesar upplýsingar víðari, t.v.s. bæði tá talan er um grannar og grannar við partsstøðu.

Umsøkjarnir í ítøkiliga málinum høvdu ikki givið samtykki til, at kommunan lat 3. persóni upplýsingar um framtíðar heilsustøðuna hjá teimum.

Upplýsingarnar um framtíðar heilsustøðuna hjá húskinum vóru eftir mínum tykki heldur ikki neyðugar fyri, at grannin kundi meta um, hvussu ætlaða byggingin kundi ávirka hann, ella um byggingin kom at vera honum til ampa.

Tá tað sostatt ikki var neyðugt at lata hesar persónsupplýsingar víðari, fyri at kommunan kundi útinna sína uppgávu sum byggimyndugleiki, hevði kommunan ikki nakað heimildargrundarlag at lata upplýsingarnar um framtíðar heilsustøðuna hjá húskinum víðari til grannan.

Hetta merkir, at uttan mun til, um grannin, sum fekk nevndu heilsuupplýsingar frá Tórshavnar kommunu, bert var granni ella eisini partur, so hevði kommunan onga heimild at geva honum hesar viðkvæmu persónsupplýsingar um húskið hjá umsøkjarunum.

At Tórshavnar kommuna, uttan samtykki frá umsøkjarunum og uttan serliga lógarheimild, hevur latið upplýsingar um framtíðar heilsustøðuna hjá húski teirra, t.v.s. viðkvæmar persónsupplýsingar víðari til granna, er ikki í samsvari við reglurnar um tagnarskylduna sambært § 26 í fyrisitingarlógini og ikki í samsvari við §§ 8, 9 og 10 í persónsupplýsingarlógini.

Í skjalatilfarinum, sum eg havi fingið frá Tórshavnar kommunu um viðgerðina av grannahoyringum í byggimálum, er spurningurin um at lata persónsupplýsingar víðari til 3. persón/granna ikki viðgjørdur. Eg kann tó ikki við hesi kanning staðfesta, um latan av persónsupplýsingum til 3. persón, herundir viðkvæmar persónsupplýsingar, er ein almennur

trupulleiki hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við hoyringar í byggimálum, ella um talan er um eitt einstakt føri.

Eg haldi tó, at tað er av stórum týdningi, at Tórshavnar kommuna gevur spurninginum um at lata persónsupplýsingar víðari til 3. persón serligan ans í sambandi við hoyringar í byggimálum.

Eg fari samanumtikið at geva Tórshavnar kommunu eina átalu fyri handfaringina av grannahoyringini í ítøkiliga klagumálinum, og fari samstundis at heita á Tórshavnar kommunu um at endurskoða sínar mannagongdir um hoyringar í byggimálum.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður